VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Heilsa og fólkaheilsa

Í gjár tustu fólk út á havnagøtur at renna fyri fólkaheilsuni. Hetta frálíka og afturvendandi tiltakið fekk í ár betri undirøku enn nakrantíð áður. Tað er alt, sum bendir á, at vit í Føroyum uppliva eitt støðugt vaksandi tilvit um heilsu og heilsubøtandi lívsstíl. Politiski áhugin fyri fólkaheilsuni er øktur seinastu árini, og hetta er ikki minst landsstýrismanninum í heilsumálum fyri at takka. Men eisini tey mongu áhugafeløgini, sum taka sær av áhugamálum hjá fólki, ið hava ella hava verið rakt av ávísum sjúkum gera eitt framúrskarandi arbeiðið til tess at upplýsa og fyribyrgja. Sama er um Fyribyrgarráðið at siga.

Eitt gott dømi um úrslitið av øllum hesum heilsuliga strevi hjá politiskum myndugleikum eins væl og hjá NGO felagsskapum er roykingin. Tað er í dag eingin, sum ivast um vandan við royking. Tað er í dag øllum greitt, at royking er ein atvoldin til ikki bara hjarta- og lungnasjúkur men til aðrar álvarsamar sjúkur við. Fara vit bert fá ár aftur í tíðina, mundi fáur duga at ímynda sær, hvussu nógv hugburðurin til royking, fór at broytast. Tað er lítið at ivast í, at almenni roykipolitkkurin hevur breiða undirtøku í fólkinum, og vit fara heilt vist at síggja tær jaligu fylgjurnar av hesum politikki um nøkur ár.

Eitt anna mál, sum tað má vera orsøk at meta sum eitt fólkaheilsumál, er ferðslan og tær mongu ferðsluvanlukkurnar. Ferðslutrygd ger ivaleyst sítt besta til tess at minka um vandarnar í ferðsluni, men kortini so stendur ikki væl til. Tað tykist vera eitt rák um øll Norðurlond, at ferðsluvanlukkurnar aftur fara at vaksa í tali eftir nøkur á við eini jaligari gongd. Vónandi fara avvarðandi mydugleikar at taka hetta mál í størsta álvara við at meta ferðslutrygd sum eitt fólkaheilsumál, soleiðis at neyðuga fíggjarliga og fakliga orkan verður sett inn á hesum øki.

Eitt triðja fólkaheilsumál, ið her skal verða nevnt er mál, ið varð umrøtt í vikuskiftisblaði okkara. Her var viðtala við føroyskan yvirlækna, Johan Poulsen, ið arbeiðir uttanlands. Læknin er serfrøðingur í urologi. Yvirlæknin ger vart við, at vit í Føroyum eru eftirbátur, tá tað ræður um at fyribyrgja og grøða krabbamein í prostata. Johan Poulsen sigur, at alt ov nógvir føroyskir menn ganga við prostata krabbameini uttan at fáa tað staðfest, fyrr enn krabbameinið hevur breitt seg, og tá er mangan ov seint at fáa lekjandi viðgerð. Hetta er niðurstøðan hjá serfrøðingi. Hann sigur víðari, at prostatakrabbamein hevur verið eitt forsømt øki í Føroyum. Hann heldur, at lítið hevur verið gjørt fyri at staðfesta sjúkuna. Meðan onnur lond hava sett í verk skjótar og virknar viðgerðir, so hevur føroyska skipanin ikki fylt við, sigur føroyski yvirlæknin. Í øðrum londum verður nógv gjørt fyri at upplýsa og fyribyrgja alt við góðum úrslitum. Hetta er eisini eitt fólkaheilsumál, sum avvarðandi myndugleikar eiga at taka í størsta álvara.

Sosialurin

Eitt framtíðarynski frá einum námsfrøðingi

ANJA SANDOY
námsfrøðingur

Nýggi skúlin á Sandi sær sera snotuligur út. Har er rúmligt inni, og tá hann stendur liðugur, verður hetta eitt stórt frambrot í bygdini. Gamli skúlin hevur tænt fyri seg, hann er meira enn 125 ára gamalur. Ein vildi hildið, at hann fyri eftirtíðina kundi verið gjørdur um til eitt fornminnissavn, tí skúlin jú, í sjálvum sær, er eitt fornminni. Hann hevur húsað nógvum børnum og lærarum, og síggja tey út til at hava trivist gott í honum, gjøgnum tíðina. Næmingar og lærarar hava í hvussu so er ikki verið kend fyri at lata illa at umstøðunum. Og at fáa ein nýggjan skúla, er teimum sera væl unt, tí børnini eru jú okkara framtíð.

Tað er tó eitt men... Eitt ynski er afturat frá bygdafólkinum. Veit ikki, hvussu onnur foreldur hava tað, hugsi at tey halda sum eg, ið fegin vildi ynskt, at vit nakað skjótt fara at hugsa um at byggja nýggjan barnagarð her í bygdini. Sjálv starvist eg sum námsfrøðingur í Barnagarðinum á Teigunum á Sandi. Og eg havi ikki hoyrt eitt orð um, at kommunalpolitikarnar hava framtíðarætlanir um at byggja ein nýggjan stovn til okkara smáu borgarar.

Í Barnagarðinum á Teigunum ganga í løtuni eini 55 børn. Talið av starvsfólkum er, til dags dato, 13 fólk. Umstøðurnar har eru alt annað enn góðar. Sjálvur barnagarðurin húsast í einum elligomlum húsum, ið vórðu umvæld fyri eini 8 árum síðani. Tey eru lítil, ja so lítil, at øll 55 børnini als ikki rúmast inni har. Í Lítlu Lon, hetta er vøggustovan, ganga til dagligt 11 børn, og í Mið Lon ganga 16 - 18 børn. So er tað Lítli Teigur, ið er ein útibarnagarður, ið í løtuni rúmar 24 børnum.

Útibarnagarðurin, Lítli Teigur, sá dagsins ljós fyri knapt 5 árum síðani, tá Sands kommuna fór undir ein leigusáttmála við Zion á Sandi, tí tey áttu eitt samkomuhús, ið liggur undir liðuni av barnagarðinum. Húsið var als ikki nýtt til tað endamál, ið tað varð bygt til, og stóð tað nærum tómt alt árið. Her hava so millum 20 og 30 børn saman við starvsfólkum húsast til dagligt í hesi 5 árini. Hølini vóru ikki 1. Floks, men við at nýta tey til eitt tilhaldsstað hjá einum útibarnagarði, bar hetta væl til.

Men nú er Zion selt til brøðrasamkomuna í bygdini, og vilja tey fegin nýta húsið til tað, sum tað er bygt til. Tey hava sostatt uppsagt leigusáttmálan við Sands kommunu til 1. Januar 2009. Hetta vil við øðrum orðum siga, at børn og starvsfólk í útibarnagarðinum, Lítli Teigur, eru heimleys eftir 1. Januar 2009, um leigusáttmálin ikki verður longdur.

So er tað, at vit, starvsfólkið á Teigunum, hava frætt, at gamli skúlin, ið er eldri enn 125 ár, skal nýtast til barnagarð, tí hann jú fer at standa tómur, tá nýggi skúlin verður liðugur. Ja, hetta ljóðar eitt sindur løgið. Húsið er 125 ára gamalt, og tað kann ikki longur nýtast til skúla; men til barnagarð, tað kann tað nýtast til. Tað eru jú bara nøkur børn og nøkur fá starvsfólk, ið skulu húsast har í eitt óavmarkað tíðarskeið.

Eg síggi hetta sum eina sera vánaliga lappaloysn til okkara smáu borgarar her í Sands kommunu. Vit hava eitt stórt og snotuligt ellisheim til okkara gomlu, óhjálpnu borgarar, eitt vælvirkandi tilhald til tey eldru, ið eru før fyri at ganga sjálvi. Og nú ein spildurnýggjan skúla til okkara skúlabørn. So mugu vit ikki gloyma okkara allarminstu borgarar. Tey kunnu ikki bara tveitast inni í eitt gamalt fornminni av einum húsum. Og um gamli skúlin skal nýtast til hetta endamál í 2009, so skulu jú nógvar og kostnaðarmiklar umvælingar gerast, áðrenn børnini kunnu ganga har. Og hetta síggi eg sum eitt peningaspill, ið kundi verið betri umsitið.

Sum foreldur og námsfrøðingur, vil eg altíð geva børnunum tað besta, og tað fái eg ikki gjørt, undir verðandi umstøðum.

So eg havi eina bøn til okkara kommunalpolittikarar og komandi valevni, nú tað nærkast einum kommunuvali: Hugsið um, at okkara smáu børn skulu hava tað besta. Um tað so kostar eina kommunusamanlegging.

Skommin gerst enn størri!

ARCHIBALD BLACK

Tjóðveldið hevur ein trupulleika. Hesin trupulleikin hevur víst seg at verið eitt hent amboð og ørindasveinur hjá teimum, ið vinna mest burtur úr at halda landbúnaðinum í einari avoldaðari skipan.

Tað verður áhugavert at síggja, hvør, ella um nakar, tekur undir við uppskoti hansara. Statsrikin planbúskapur er annars nakað eingin løgtingslimur sigur seg taka undir við.

Áheitan

Við hesum vil eg heita á bóndafelagið um at finna ein stjørnuløgfrøðing av meginlandinum og síðani at melda Føroya løgting til mannarættindadómstólin í Haag fyri "ólika viðferð av borgarum í sama landi" ella við øðrum orðum, allari festiskipanini, sum hon er. Í slíkum føri fæst frí rættargongd.

Tá ið málið síðani er vunnið, sendir dómstólurin rokningina til løgtingið.

Hetta mál fer at senda afturljóð langt út um landoddarnar, og skommin gerst enn størri!

Á Grønaból

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Redaktiónsleiðari: Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.